# Meistarar úr Stjørnuni



Við sigri 26-12 á VÍF leygardagin gjørdust gentur-16 hjá Stjørnuni føroyarmeistarar

Á myndina eru tað Rógvi Nielsen, venjari, Biretha Joensen, Louisa Andreasen, Edith Hansen, Rósa Lassen, Durita Mikkelsen, Otto Jacobsen, hjálparvenjari, Karina Hansen, Diana Poulsen, Sigrid Jacobsen, Maria Zisakson, Hanna Mikkelsen og Ella Mørkøre

# VÍF basti Søljuni

**Mest óvæntaða úrslitið kom í Vestmanna, har Søljan misnýtti átta brotskøst**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Tað tykist, sum ætlar Stjørnan at minka munin í málum til VB niður í einki. Í øllum førum var eingin sum helst slingur í valsinum, tá Stjørnan skírishósdag vitjaði StÍF, sum annars hevur givið meistarunum stórar trupulleikar í ár. Somikið stórar, at júst dystirnir móti StÍF hava verið sera dýrir, tá tosast skal um fyrimunin, sum VB hevur í málmuni.

Og Stjørnan skal vinna stórt mest sum hvørja ferð, um teimum skal eydnast at fáa VB aftur. VB hevði hesaferð vitjan av Neistanum, ið helst er einasta liðið, sum kann arga oddin, men tað eydnaðist so ikki hesaferð, tó at Neistin argaði fyri steðgin. Eftir steðgin kom VB fyri seg, og so settu tær alt upp á pláss.

Mest óvæntaða úrslitið kom í Vestmanna, har tað eydnaðist VÍF at basa Søljuni. Tað skuldi tó framúr annansmálsspæl til, áðrenn stigini vóru vís, og millum annað mátti Søljan finna seg í, at ikki færri enn átta av 12 brotskøstum vórðu misnýtt fyri teirra viðkomandi.

Seinasti dysturin stóð millum Kyndil og Tjaldur, og her vann Kyndil ein tryggan sigur á Tjaldri, sum altso framvegis er stigaleyst í botninum.

## Fakta um dystirnar

**StÍF-Stjørnan 15-44 (9-20)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Poula D. Olsen 6(1), Malan Petersen 2, Sunfríð B. Jacobsen 2, Rebekka Justinussen 2(2), Rósa Johannesen 1, Paula B. Høgnesen 1, Bára S. Danielsen 1
**Stjørnan:** Katarina Stepanov 12(4), Bára S. Klakstein 9, Anna Kristina Samson 7, Una Olsen 7, Annika Ljósstein 5(1), Alina Olaru 4
**Brotskøst:** StÍF 4, Stjørnan 7
**Útvísingar:** StÍF 6, Stjørnan 3
**Diskvalifikatión:** StÍF 1 (3X2 minuttir)

**VÍF-Søljan 27-25 (13-15)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Ioana Rápa 8(3), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 8(2), Finngerð Jensen 4, Alis Høghamar 3, Linda Johannesen 3
**Søljan:** Nicoleta Radu Hansen 14(4), Una á Steig 2, Lina Andriulyte 2, Kristianna Petersen 2, Heidi Maria Akselsen 1, Fía Selma Nielsen 1, Hertja Simonsen 1, Petra Thomassen 1
**Brotskøst:** VÍF 9, Søljan 12
**Útvísingar:** VÍF 5, Søljan 4
**Diskvalifikatión:** Søljan 1 (3X2 minuttir)

**Kyndil-Tjaldur 27-12 (10-7)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Linda Weihe 12, Ann Mari Wang 5(3), Randi Wardum 4, Ronsa Mikkelsen 2, Halla Midjord 1, Anya Midjord 1, Aydna Apol 1, Hildur Høghamar 1
**Tjaldur:** Jacoba Langgaard 4(2), Heidi Sevdal 3, Lív Klein 1, Anni Højgaard 1, Anna Hansen 1, Hanna Isaksen 1, Kirstin Jacobsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 4, Tjaldur 2
**Útvísingar:** Tjaldur 2

**VB-Neistin 29-23 (14-15)**
**Málskjúttar**
**VB:** Daiva Toumaite 8(4), Aukse Vysnaiskaite 6, Rannvá Augustinussen 5, Christina Holm 4(1), Gurið Mortensen 3, Laila Jespersen 2
**Neistin:** Ása á Neystabø 5, Marjun Tróndarson 4(1), Jórun Ludvík 4, Lív Sørensen 3, Simona Petersen 3, Annika Thomsen 2(1), Kára á Dunga 2
**Brotskøst:** VB: 8, Neistin 5
**Útvísingar:** VB 2, Neistin 2

# SÍ helt sessinum

Sum besta liðið í 1. deild í vetur skuldu kvinnurnar hjá Fleyr royna at endurvinna sessin í meistaradeildini, tá tær um páskirnar spældu upp- og niðurflytingardyst móti SÍ.

Einki er at ivast í, at Fleyr – sum fyri fyrstu ferð hevur besta liðið í næstbestu deildini – hevði vónir um at koma uppaftur í meistaradeildina, men tað eydnaðist so ikki á hesum sinni.

SÍ vann nevnliga dystin 3-0, og hava tær sostatt framvegis lið í bestu deildini, har málið er at menna ungu leikararnar, soleiðis at tær um nøkur ár kunnu gera seg meira galdandi í ovaru hálvu av stigatalvuni.

Tað var tó dyggur smeitur hjá Fleyr, at tær tíðliga í dystinum mistu Rúnu Hentze, sum fekk skaða. Fram til hetta hevði talan verið um ein javnan dyst, og hóast Fleyr aftur í øðrum setti royndi at trýsta, so gav hetta ikki úrslit. SÍ var snøgt sagt betri fyri, og ikki minst í álopsspælinum fyri netinum var sjónligt, at munur var á.

Endaliga úrslitið gjørdist 25-14, 25-22 og 25-15 til SÍ, sum altso framvegis hevur lið í bestu kvinnudeildini, tá felagið fer undir sítt 101. ár sum virkið ítróttarfelag.

-jm

## Formula-deildin

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Skála | 1 | 1 - 0 - 0 | 5 | 1 | 4 | 3 |
| 2 KÍ | 1 | 1 - 0 - 0 | 4 | 3 | 1 | 3 |
| 3 EB/Streymur | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 4 NSÍ | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 5 ÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 6 HB | 1 | 0 - 0 - 1 | 3 | 4 | -1 | 0 |
| 7 GÍ | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 8 VB | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 9 B36 | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 10 TB | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 5 | -4 | 0 |

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 8 | 8 - 0 - 0 | 715 | 438 | 277 | 29 |
| 2 Stjørnan | 8 | 7 - 0 - 1 | 625 | 422 | 203 | 27 |
| 3 Neistin | 8 | 5 - 0 - 3 | 619 | 471 | 148 | 20 |
| 4 Søljan | 8 | 4 - 0 - 4 | 591 | 511 | 80 | 16 |
| 5 VÍF | 7 | 3 - 0 - 4 | 496 | 485 | 11 | 11 |
| 6 Kyndil | 8 | 3 - 0 - 5 | 441 | 588 | -147 | 9 |
| 7 StÍF | 7 | 1 - 0 - 6 | 457 | 576 | -119 | 7 |
| 8 Tjaldur | 8 | 0 - 0 - 8 | 314 | 767 | -453 | 0 |